# Vit fara nú at gera meiri vart við okkum

**Ráðið fyri Ferðslutrygd fer nú at leggja á annan bógv. Hereftir skulu vit gera meiri burturúr at vísa á, hvar vit eiga at bøta um trygdina, sigur Jón Kragesteen**

FERÐSLUTRYGD
*Áki Bertholdsen*



*– Hereftir skal Ráðið fyri Ferðslutrygd virka meiri sum ein brúkarastovnur, enn vit hava gjørt higartil, sigur Jón Kragesteen,*

Ráðið fyri ferðslutrygd skal vera nógv sjónligari í framtíðini, enn tað hevur verið.

Jón Kragesteen, leiðari á Ráðnum fyri Ferðslutrygd, sigur, at ráðið fer nú at leggja á annan bógv.

Higartil hevur politikkurin hjá Ráðnum verið ikki at gera nógv um seg í sambandi við vanlukkur og óhapp.

– Higartil hava vit bert lagt okkum eftir at arbeiða fyri tí, sum øll eru samd um, t.d. um at fáa øll at nýta endurskin, trygdarhjálm, trygdarseðlar o.s.fr.

– Við øðrum orðum hava vit bara borið vitan víðari, sum ongir trupulleikar kunnu standast av.

Hinvegin hava vit ikki gjørt nógv burturúr at bera vitan og ráðgeva um mál, har vit kunnu koma upp á tvørs av stovnum og myndugleikum. Tað hava vit ikki gjørt, tí vit hava lagt stóran dent á samstarv við stovnar og myndugleikar.

– Av tí sama hava vit ikki gjørt nógv við at ráðgeva myndugleikar um, hvørjar ábøtur, vit halda eiga at vera gjørdar á vegastrekkum ymsastaðni kring landið.

Men Jón Kragesteen sigur, at Ráðið fyri Ferðslutrygd fer nú at broyta politikk á hesum øki.

– Hereftir skulu vit virka meiri sum eitt brúkafelag og vera ein mótpólur til myndugleikarnar, tá ið tað um ferðslutrygd um ræður, tí slíkan mótpol hava myndugleikarnir ikki í løtuni og tað er tað saknur í.

– Frameftir fara vit í nógv størri mun at vera geva myndugleikunum eitt mótspæl, tá ið ferðslutrygd umræður.

Hann sigur at hereftir fer Ráðið fyri Ferðslutrygd í størri mun virkar um ein andstøða til myndugleikarnar og fer at gera meiri vart við seg við at vísa á pláss, har vit halda, at tað tað er neyðugt at gera ábøtur og broytingar fyri at bøta um trygdina.

– Har vit kunnu vísa á, at umstøðurnar hava gjørt avleiðingarnar av einumn óhappi verri, enn neyðugt, eiga vit at bøta um trygdina Hann heldur, at Ráðið fyri Ferðslutrygd saktans kann samstarva við stovnar og myndugleikar, hóast tað ikki er samt við hesar somu stovnar og myndugleikar.

Jón Kragesteen sigur, at, at tá ið eitt óhapp, ella ein vanlukka er hend, er tað neyðugt at kanna umstøðurnar at broyta tað, sum er neyðugt, fyri at bøta um trygdina, soleiðis at avleiðingarnar av teimum mistøkum, sum henda, verða avmarkaðir.

# Nú má okkurt gerast við vegin í Øravík

**Boðskapurin hjá okkum er púra greiður: SEV-tornið í Øravík má flytast, ella má bilaverja setast eftir vegjaðaranum, sigur Jón Kragesteen á Ráðnum fyri Ferðslutrygd, nú aftur ein bilur hevur rent á tað umstrídda tornið**

FERÐSLUTRYGD
*Áki Bertholdsen*



*Í farnu viku hendi tað aftur: Ein bilur rendi á umstrídda SEV-tornið, sum stendur beint við vegin í Øravík. Hesuferð kostaði tað ein brotnan arm og ein knústan bil. Ráðið fyri Ferðslutrygd heldur, at tað er neyðugt bøta um ferðslutrygdina*

– Nú má okkurt gerast við vegin í Øravík.

Tað heldur Jón Kragesteen, leiðari á Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

Nú ein bilur einaferð enn rendi á umstrídda SEV-tornið, sum stendur beint við vegin í Øravík, er kjakið aftur tikið seg upp um ferðslutrygdina á hesum vegastrekkinum kyknað uppaftur.

Seinastu 14-15 árini eru fimm tilburðir skrásettir, har bilar hava rent á tornið, sum ikki stendur meiri enn ein metur ella tveir frá vegnum, mitt í einum svingi.

Men tað er onki loyndarmál, at tað eru ikki øll óhapp, sum verða fráboðað, so veruliga talið á bilum, sum hava rent á tornið, er nógv størri.

Verða so óhappini løgd afturat, sum eru har á leiðini, men har bilarnir av tilvild ikki hava rakt sjálvt tornið, gerast talið nógv hægri.

Tað var eftir syndarligu vanlukkuna í september í 1999, har tríggir ungir dreingir lótu lív, at fólk av álvara fóru at tosað um at tað var neyðugt at gera nakað við ferðslutrygdina á hesum vegastrekkinum.

Men kjakið dovnaði skjótt aftur og síðani hevur lítið og onki verið at hoyrtheilt til nú, aftur eitt óhapp hendi, har ein bilur fekk heilt stóran skaða og ein maður varð fluttur á sjúkrahúsið við brotnum armi.

## Okkurt má gerast

Men nú kjakið er kyknað uppaftur eftir hetta seinasta óhappið hava vit spurt leiðaran á Ráðnum Fyri ferðslutrygd, um hann hevur nakra meining um hetta vegastrekkið.

Tað hevur hann og boðskapurin frá honum er púra greiður: Umstøðurnar á Landsvegum í Øravík mugu gerast betri.

– Á einum vegastrekkið, sum hevur kostað so nógv, sum hetta strekkið í Øravík hevur, er tað sjálvsagt, at okkurt má gerast, heldur Jón Kragesteen.

Hann sigur, at antin má tornið flytast, ella má vegurin flytast, ella má bilaverja setast uppp framvið vegnum.

– Okkum tørvar ikki fleiri prógv um, hvussu hættisligt hatta vegastrekkið er, enn vit longu hava fingið.

– Tað kostar ikki nógvar túsund krónur at seta nakrar metrar av bilaverju upp so at tornið er avbyrgt og tað hevði í hvussu so er hjálpt munandi um ferðslutrygdina, sigur Jón Kragesteen.

– Í øllum førum eigur tað at vera gjørt beinanvegin, sum ein fyribils loysn, til ein verandi og endalig loysn er fingin á vegastrekkinum, sigur leiðarin á Ferðslutrygd.

## Eitt arbeiðspláss

Jón Kragesteen sigur, at vit eiga altíð at gera, tað, vit kunnu, fyri at gera umstøðurnar so tryggar sum gjørligt.

– Mistøk henda altíð og tey óhapp, sum henda, eru avleiðingar av mistøkum. Men eg haldi, at tað altíð áliggur okkum at gera umstøðurnar so góðar so gjørligt, fyri at avmarkað avleiðingarnar av teimum óhappum sum henda, so at tery ikki so ofta, sum tey nú gera, føra til deyða, avlamni og skaða.

Hann sigur, at vegirnir eiga at vera mettir sum eitt arbeiðspláss.

– Á arbeiðsplássum gera vit tað, vit kunnu, fyri at tryggja maskinur og amboð, so at mistøk og óansni hjá teimum, sum arbeiða við teimum, ikki skulu føra til skaðar og avlamni.

Á arbeiðsplássunum er tað arbeiðsgevarin, sum hevur skyldu til at gera umstøðurnar so góðar sum gjørligt, fyri at avmarka avleiðingarnar av óhappum.

Sama hugburð eiga vit at hava tá ið tað ræður um ferðslutrygd, sigur Jón Kragesteen.

– Og á vegnum í Øravík eiga vit eisini at hugsa um, hvat vit kundu broytt. Og tá ið tornið stendur soleiðis fyri, at tað er lætt at koyra á tað, eigur okkurt at vera gjørt fyri at avmarkað tann vandan

Hann sigur, at hetta er ikki ein spurningur um at at taka ábyrgd frá bilførarunum. Men tá ið eitt lív er mist, lítil uggi í at tosa um ábyrgd. Tað eru slíkum missum, vit mugu forða fyri, sigur Jón Kragesteen.



Løgmaður:

# Hesuferð spjaðir sjálvstýrisvongin

**Løgmaður vísir avgjørdur aftur, at hann leypir á frælsið at bera egin sjónarmið fram og skipa seg, soleiðis sum oddamaður í Hesuferð heldur, at løgmaður ger**

HESUFERÐ
*Eyðun Klakstein*



*– Tað er ómetaliga spell, at slíkt virksemið skal spjaða tann føroyska sjálvstýrisvongin, og eg eri fegin um, at hetta teldubrævið kann vísa føroyingum, hvussu tað verður arbeitt, sigur løgmaður um teldubrævið hjá Hesuferð*

– Tað er púra burturvið at leggja meg undir at leypa á frælsið at skipa seg og at bera egin sjónarmið fram. Hesuferð kann gera og halda tað, tey vilja, men tað er gott at fólk hava fingið at vita, hvussu átakið arbeiðir.

Tað sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður, sum fríggjadagin tók eitt óvanligt stig, tá hann sendi út eina ávaring ímóti innihaldinum í einum teldubrævi frá átakinum Hesuferð.

Í hesum teldubrævi, sum eitt av oddafólkunum í átakinum, Kjartan Hoydal, hevði skrivað, vórðu fólk biðin um at mótmæla samráðingarleiðini hjá løgmanni mótvegis donsku stjórnini.

Kjartan Hoydal heldur, at løgmaður leypir á frælsið hjá fólki at skipa seg og bera sjónarmið fram, tá hann almennakunnger teldubrævið og ávarar ímóti innihaldinum.

– Hetta teldubrævið kom mær í hendi, og tað, sum eg vildi við at almannagera tað, var at vísa almenninginum, at vit kunnu vænta eina herferð ímóti samráðingarviljanum hjá løgmanni, sigur Anfinn Kallsberg.

## Spjaðing er úrslitið

Løgmaður heldur lítið um innihaldið í brævinum hjá Kjartani Hoydal.

– Tað, sum er kjarnin í hesum máli, er, at Hesuferð sendir eitt bræv út til 52 teldupostadressur og biður um talsmenn fyri eini kampanju ímóti samráðingarviljanum hjá løgmanni mótvegis donsku stjórini. Hesuferð roynir við hesum at stríðast í móti einum politikki, sum byggir á eina løgtingssamtykt um sjálvsstýri og er tann gongda leiðin í sjálvstýrismálinum, sigur løgmaður.

– Tað er ómetaliga spell, at slíkt virksemið skal spjaða tann føroyska sjálvstýrisvongin, og eg eri fegin um, at hetta teldubrævið kann vísa føroyingum, hvussu tað verður arbeitt.

Løgmaður ætlar ikki at taka brævið upp í samgonguni, men hann sigur seg kenna onkur av sjónarmiðunum aftur frá tingfólki hjá Tjóðveldisflokkinum undir viðgerðini av løgmansrøðuni.

## Einki mistak

Anfinn Kallsberg heldur ikki, at tað var eitt mistak, at teldubrævið frá Hesuferð var sent teimum ávísu fólkunum á adressulistanum.

– Tað vóru so at siga tær somu teldupostadressurnar, sum fingu eitt líknandi bræv frá Hesuferð í februar mánaði. Tá bað átakið fólk um at mótmæla, at fólkaatkvøðan var avlýst, sigur løgmaður.

Ta ferðina var brævið skrivað av øðrum fólki í Hesuferð, men send so at siga somu fólkum, sum hesuferð fingu brævið frá Kjartan Hoydal.

Tað heldur løgmaður vísir, at tað var einki mistak, at fólk fingu seinastu áheitanina frá Hesuferð.

– Tað er ein hóttan ímóti demokratinum, tá hvør einstakur ikki sleppur at taka sínar avgerðir sjálvur. Tí eri eg glaður um, at almenningurin hevur fingið innlit í hetta teldubrævið, sigur Anfinn Kallsberg.

# Oljuráðlegging í høvuðsstaðnum

**Herfyri reisti byráðslimurin Jógvan Arge spurningin um at seta nevnd í kommununi at taka sær av oljuráðlegging í sambandi við eina komandi oljuvinnu. Málið varð fyri á býráðsfundi 4. juli og varð tað beint til viðgerðar í Fíggjarnevndini.**

OLJURÁÐLEGGING
*Jan Müller*



*Jógvan Arge, hevur sum tíðindamaður fylgt væl við í oljumenningini. Her er hann á vitjan á útlendskum boripalli. Nú vil hann sum býráðslimur hava at býráðið setur nevnd at taka sær av oljuráðlegging*

Jógvan Arge sigur seg vóna, at málið fer at fáa góða undirtøku og í hesum sambandi vísir hann á álitið, sum oljuráðleggingarnevndin hjá landsstýrinum legði fram fyri fýra árum síðani – tann 10. juli 1997.

Tá varð fleiri ferðir nevnt, at í forkanningar- og leitingarstigunum var neyðugt at gera útreiðingar av ymsum spurningum, sum tóku seg upp í orðaskiftinum um tilstundandi oljuvinnu í Føroyum. Hesi viðurskifti eru serliga viðgjørd undir yvirskriftini »Andre påvirkninger« á síðunum 380-385 í donsku útgávuni og eisini har frammi í álitinum á s 51-52 undir samanumtøkum.

Vísast kann t.d. á síðu 384, har oljuráðleggingarnevndin sigur: »Der kan peges på, at der foreligger et righoldigt materiale af samfundsmæssige konsekvensanalyser m.v. i forbindelse med olieudvikling i samfund, der har lighedspunkter med Færøerne. Eksempler vil kunne hentes fra Norge, Skotland, Shetlandsøerne, Orkneyøerne, New Foundland o.s.v.

Jógvan Arge sigur, at tað er ein góður botnur fyri víðari viðgerð av málinum at orientera seg í hesum álitinum, sum er av teimum frægu, og tá sæst skjótt, at so at siga ongar av teimum útreiðingum, sum oljuráðleggingarnevndin sá fyri sær tá, eru gjørdar um møguliga ávirkan av oljuvinnu uppi á landi í Føroyum.

– Sostatt kemur Tórshavnar Kommuna at ganga á odda at royna at gera sær greitt, hvat fer at henda og hvat verður neyðugt at gera tann dagin, olja verður funnin undir Føroyum og farið verður at fyrireika framleiðslutíðarskeiðið, sum fær nógv ta størstu ávirkanina á samfelagið. Eg haldi tað hevur stóran týdning, at kommunan vísir flaggið, og tað er ikki nóg mikið at lata oljufeløgini eiga meginpartin av kanningunum og álitunum.

Fyrireikingin til framleiðsluna fer at taka nøkur fá ár, eftir at lønandi olju- og/gassfundir eru staðfestir, so enn eru ikki allar súðir syftar. Vit hava stundir til at venda spurningunum bæði væl og virðiliga sigur Jógvan Arge í einum brævi hann hevur sent formanninum í Fíggjarnevndini, borgarstjóranum Jan Christiansen.

Jógvan Arge vísir á, at tað er umráðandi er at gera arbeiðssetningin neyvan, at hava fólk burtur av til at gera tað verkliga arbeiðið eina tíð og at hava eina dugnaliga nevnd ella bólk til at seta út í kortið og taka samanum.